# Maskinsmiður til Vestmanna Kommunu

Søkt verður eftir maskinsmiði til Vestmanna Kommunu at byrja sum skjótast.

Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:

- viðlíkahald og umvæling av maskinum, bilum, skeltum v.m.
- uppgávur í toyminum, sum tekur sær av dagliga viðlíkahaldinum og nýgerðum í bygdini
- kavagrevstur og salting
- annað fyrifallandi

Førleikakrøv:

- útbúgving sum maskinsmiður
- stóra koyrikortið og kranaloyvi er ynskiligt
- góð samstarvsevni og tænastusinni
- gott handalag
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt

Tilvísing er til arbeiðsformannin hjá Vestmanna Kommunu.

Talan er um fulltíðarstarv og verður lønt sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og KAF.
Meira fæst at vita um starvið við at ringja til arbeiðsformannin, tlf. 770126.

Umsóknir skulu vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi mikudagin 6. november 2019 kl. 12.

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 8**
**Postboks 91**
**355 Vestmanna**
**ella til vestmanna@vestmanna.fo**